# TILTØK

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman** *Yviri við Strond*
Eingi møti sunnudagin ella um jólini

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Mánakvøldið kl. 20
Bønar/uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Filadelfia Tórshavn**
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Fríkirkjan Oasan** *Kirkjustræt*
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
*Vit spæla og syngja í gongugøtuni*
Týskvøldið kl. 19.

**Frelsunarherurin Vágur**
Mánadagin kl. 20 bøn
Týsdagin kl. 09.30 orðið á borðið.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin eingin bíbliutími.

**Saron, Vestmanna**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Týskvøldið kl. 20 bønarmøti.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Týskvøldið kl. 20
Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Mánadagin kl. 06.15 morgunbøn. Kl. 20 bønarmøti.
Týsdagin kl. 06.15 morgunbøn.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Tilhaldið í Tórsgøtu,
tlf: 316491/286491
Teldupostur:tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til fríggjadag kl. 9-17.
**Sølusframsýning**
21. des - 23. des. Sølaframsýning í kjallaranum í Tilhaldinum, Rannvá Simonsen.
**Tilhaldið er afturlatið frá 21. des. til og við 8. jan.**

# HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið vóru við til at gera hjúnarbandsdag okkara 20.08.09 ógloymandi. Takk fyri blómur, gávur og heilsanir. Tykkum øllum verður ynkst eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.
**Vinarliga Hertha og Bergur**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum sum á ymiskan hátt gjørdu fermingardag mín 4. oktober, so hugnaligan. Gleðilig jól og gott nyggjár.
**Ynskja**
**Otto R. Petersen, Saltnes**

**Tøkk**

Hjartans tøkk til tykkum øll bæði av bygd og bý, sum mintust og gleddi meg á føðingardegnum tann 15. nov. og gjørdi mær dagin ógloymandi. Gleðilig jól og Harrans ríku signing ynski eg tykkum øllum.

**Kærastu heilsanir Elinbjorg Haraldsen**



Ein ógloymandi dagur var 1. des. fyri okkum bæði. Takk fyri tit ið vaktu okkum við hornblástri, sangji og morgunmati. Solveig og Henning Bøgesvang takk fyri ómakin. Stóra takk til familju og til tín Róði, starvsfelagar okkara og vinfólk fyri hjálpandi hendir og so øll tit í løgdu leiðina framvið í Skálanum. Talir, sangir, undirhald og gávir, stóra tøkk øll somul. Gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.
**Blíðar heilsanir**
**Giggi og Finn Stampe**



**Góði Petur**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum í dag. Tað verður spennandi at halda føðingardag og fáa eina lítlusystir heim.
**Abbi**



**Hey stóribeiggi**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 5 ára degnum. Nú mást tú taka væl ímóti lítludiddu.
**Ynskja Eva og lítladidde**


**Mentamálaráðið**

# Starvsfólk til Próvstovuna

**Starvið**
Eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum málsviðgeri er leyst at søkja á Próvstovuni.

Próvstovan hevur ábyrgdina av at skipa fyri og leggja til rættis próvtøkur í fólkaskúla-, miðnáms- og hægri skúlum.

**Arbeiðið fevnir m.a. um at:**
- Seta uppgávunevndir og samskifta við tær um at gera, prenta og senda út próvtøku-uppgávur til skúlarnar
- Málsviðgera
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðsuppgávur á Próvstovuni – innstilling til próvtøku, skemalegging, tekstuppgeving o.a.
- Saman við uppgávunevndum o.ø., gera próvtøkuuppgávur klárar til prentingar, skriva tekstir, gera uppseting (lay-out) o.a.
- Prenta, pakka og senda próvtøkuuppgávur til allar skúlar í skúlaverkinum
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til próv-stovuna, t.d. samskifti við próvdómarar o.o.
- Avgreiða samsýning í sambandi við próvtøkur.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarin hevur:
- Útbúgving og/ella royndir í skrivstovu-yrkinum ella øðrum, ið kann javnmetast við hetta
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv, eitt nú word, excel, access, power point, indesign og photo shop.
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góð samstarvsevni
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at arbeiða undir tíðartrýsti.

**Vit bjóða**
- Starvið er spennandi við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir
- Tað er eitt sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning
- Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 3.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og allar deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til: Mentamálaráðið, Postrúm 3279, 110 Tórshavn, ella sum teldupost til mmr@mmr.fo

**Umsóknarfreist**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. desember 2009, kl. 16.00. Starvið verður at seta 1. januar 2010 ella skjótast til ber.

Meira fæst at vita við at ringja til Bjarna Wilhelm, deildarstjóra í Mentamálaráðnum, tlf. 306522 ella 555022.

**Mentamálaráðið** fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og mentan, og herundir eisini dagstovnaøki, kirkjumál og ítrótt. Mentamálaráðið er bygnaðarliga skipað við 4 deildum - fólkaskúladeild, vinnu- og miðnámsskúladeild, mentamáladeild og fyrisitingardeild.
**Próvstovan** er partur av fyrisitingardeildini í Mentamálaráðnum.